
Lita tekningina
Marin

Marin

Í eini bygd var ein kona, sum kallaðist Marin. Hon búði í einum brúnum húsum við grønari tekju og hvítari grund. Húsini stóðu í eini brattari brekku.

Altíð gekk Marin við stokkum. Hvar hon so var, hevði hon stokkarnar við, og hon bant so nógv, at pápi hennara, sum var ein gamal abbi við longum, gráum skeggi, mátti karða og spinna allan dagin, og tað var ikki lítið av ull, mamma hennara, sum var ein gomul omma við gráum hári, vaskaði og nappaði.

Marin dugdi bara at binda skóleistar og sokkar, ja, og eisini hosur, tí sokkar og hosur verða bundin upp á sama máta.

Tað var skjótt, at tað bláa skrínið í køkinum hjá teimum var kjokkfult av skóleistum og sokkum og hosum, so mamma hennara og pápi hennara og hon sjálv høvdu nóg mikið upp á beinini í fleiri ár.

Marin hoyrdi allar mammurnar í bygdini kæra seg um, at børnini slitu so illa burtur av beinunum hjá sær, og so tók hon sær fyri at binda upp á øll børnini, hvítar sokkar til genturnar og morreyðar hosur til dreingirnar.

Mammurnar vóru so glaðar fyri hetta, tí tær høvdu so nógv annað at gera. Nú sluppu tær frá at hugsa um tað, og Marin fekk mangan góðan drekka-

munnin afturfyri, tá ið hon kom inn á gólvið við stokkum.

Hvønn dag gekk Marin og taldi, hvussu nógvar gentur vóru í sokkum frá henni, og hvussu nógvir dreingir vóru í hosum, sum hon hevði bundið. Við hvørt kom hon upp í 11, við hvørt upp í 14, og tá ið hon kom upp í 17, var hon glað, tí tað vóru øll børn-ini í bygdini.

Til jóla hevði Marin úr at gera, tí tá ætlaði hon at geva øllum børnunum jólagávu. Til genturnar bant hon hvítar sokkar úr heilt fínum tógvi, og dreingir-nir skuldu fáa fínar hosur úr myrkabláum tógvi, sum mamma hennara sjálv hevði litað. So áttu øll at fara í til jólatræið í skúlanum annan jóladag.

Tað var akkurát so, at Marin fekk læst seinastu hosuna av jólaaftan, áðrenn kirkjuklokkan fór at ringja.

Marin gleddi seg øgiliga til jólatræið í skúlanum, sum skuldi vera klokkan 6 annan dag. Longu klokkan 4 fór hon at pynta seg í føroysk klæði, og hon var uppi í teimum fyrstu, sum komu í skúlan.

Men neyðar Marin, tað bleiv eingin gleðiligur jóladagur fyri hana, tí hvar hon hugdi, og hvussu hon leitaði, fann hon eingi barnabein í hennara jólagavu.

Summar gentur vóru í ljósareyðum sokkum, summar í ljósabláum og summar í hvítum, men tað vóru ikki ullintir sokkar.

Dreingirnir vóru í puntutum hosum í øllum møguligum litum, og nú visti Marin, hvar hon hevði sæð hesar hosurnar fyrr: Í príslistanum, og hon mintist til, at mamman hevði sagt henni, at hatta kallaðist nylon.

Marin settist í ein krók at bína. Mammurnar bóðu børnini fara at takka henni aftur fyri jólagávuna, men Marin ønti teimum ikki aftur, og tá ið øll tóku saman hendur um jólatræið, vildi Marin ikki uppí at dansa.

Tað vardi ikki leingi, so rýmdi Marin heim til hús. Grátandi segði hon mammu síni, hvussu vorðið var, at eingin skoytti longur um tað, sum hon bant.

— Góðasta Marin, segði mamman, — tú mást ikki gráta. Minst til, at tú ert 35 ár. Nú skal eg siga tær nakað. Einki skalt tú leggja í hatta, Marin. Tú veitst, hvussu ring børn eru eftir øllum nýggjum, men tá ið kavin og frostið koma, tá man nylonið lítið fara at bata móti kuldanum, og tá fara øll í aftur tínar sokkar og hosur.

Hetta var góður uggi hjá Marini, og hon turkaði tárini burtur av eygunum.

Triðja jóladag setti hon seg aftur við stokkunum, tí mamma hennara segði, at nú fór kuldin at koma, tað gretti ikki, hon var so ring í mjødnini.

Dagin fyri nýggjársaftan var øll bygdin hvít av kava, og í brekkuni oman fyri húsini hjá Marini og

teimum spældu øll børnini í kavanum, og onkur hevði sparkara.

Øll vóru heit um beinini, tí tey vóru í ullintum sokkum og hosum frá Marini, og Marin sat glað við køksvindeygað og eygleiddi tey við stokkunum í fanginum.

M. Heinesen